Nr. 2 26. mai 2011

# Rundskriv um virksemið hjá musikknevndini

sambært § 7 í løgtingslóg nr. 69 um stuðul til musikkskúlar, sum broytt við løgtingslóg nr. 67 frá 20. mai 1996.

§ 7.1) At vera musikkskúlaleiðaranum til hjálpar at samskipa musikkundirvísingina setir landsstýrismaðurin eina nevnd við umboðum fyri musikkskúlarnar og Landsstýrismannin.
2. stk.1) Landsstýrismaðurin ger nærri reglur fyri virki nevndarinnar.

Við heimild í § 7, stk. 2 í løgtingslóg nr. 69 frá 7. juni 1984 um stuðul til musikkskúlar, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 67 frá 20. mai 1996, ásetur landsstýrismaðurin hesar reglur um virksemi nevndarinnar:

§ **1**. Landsstýrismaðurin setur nevnd, sum skal umboða musikkskúlarnar og/ella musikkskúlaøkini og Mentamálaráðið.
Umboðini verða vald soleiðis:
1 umboð fyri lokalu musikkskúla- leiðararnar fyri hvørt av hesum økjum:

- Suðuroy, Sandoy og Tórshavn,
- Vágar, Norðurstreymoy og Sunda kommunu,
- Eysturoy og Norðuroyggjar,
- 1 umboð fyri musikklærararnar,
- 1umboð fyri Mentamálaráðið.

Stendur á jøvnum í sambandi við atkvøðugreiðslu, so er formansins atkvøða avgerandi.
*Stk. 2*. Umboð verða bara vald í teimum umveldum, ið hava musikkskúla.
*Stk. 3*. Økini innstilla hvørt sær tvey umboð, kvinnu og mann, sum landsstýrismaðurin kann velja ímillum til nevndarumboð.

§ **2**. Nevndin er undir ábyrgd landsstýrismansins og skal rætta seg eftir ásetingum hansara.
*Stk. 2*. Landsstýrismaðurin velur formannin í nevndini.

§ **3**. Á nevndarfundi er umframt nevndarlimirnar eisini musikkskúlaleiðarin, ið er avgreiðslustjóri nevndarinnar.
*Stk. 2*. Tó er leiðarin ikki á teimum fundum, har viðurskifti honum viðvíkjandi verða viðgjørd.
*Stk. 3*. Nevndin kann í neyðugum vavi søkja sær sakkøna hjálp, sum eftir nevndarinnar meting kann luttaka á fundi.
*Stk. 4*. Formaðurin boðar til fundar. Um 2 nevndarlimir krevja fund, skal formaðurin skipa fyri, at fundur verður hildin.

§ **4**. Formaðurin ger fundarskrá í samráð við avgreiðslustjóran.

*Stk. 2*. Hinir limirnir kunnu fáa mál við á dagsskránna, um tey eru formanninum í hendi í seinasta lagi 2 dagar fyri fundin.
*Stk. 3*. Musikkskúlaleiðarin eigur á hvørjum fundi at kunna nevndarlimirnar um gongdina í musikkskúlanum.

§ **5**. Uppgáva nevndarinnar er:
1) at tilmæla lærarasetanir,
2) at seta fram uppskot um tilboð musikkskúlanna,
3) at ummæla øll mál, ið viðvíkja musikkskúlunum.

§ **6**. Nevndin kann í neyðugum vavi kanna viðurskifti hjá teimum musikkskúlum, ið eru settir á stovn sambært lóg um stuðul til musikkskúlar.

§ **7**. Nevndin hevur umsjón við leiðara og lærarum musikkskúlans og eigur at gera landsstýrismannin kunnugan við møgulig mál, ið eiga at verða kannað.

§ **8**. Nevndin eigur at ummæla øll tey mál, ið landsstýrismaðurin leggur fyri hana.

§ **9**. Avgerðir, ið musikkskúlaleiðarin hevur tikið, kunnu kærast til nevndina.

§ **10**. Nevndin skal góðkenna undirvísingartilboð skúlanna og kann í neyðugum vavi avmarka hesi tilboð.
§ **11**. Nevndin verður vald fyri 3 ár í senn.

§ **12**. Hetta rundskrivið kemur í gildi beinanvegin.

Mentamálaráðið, 26. mai 2011

Helena Dam á Neystabø
*landsstýriskvinna*

/Leivur Harryson
*aðalstjóri*